# Tær bestu jólagávurnar fáast í Elding



## Sertilboð

**Venson Western Guitar við Mikrofon**
SW-330
**og**
**Pro Drive akustiskur forsterkari**
30 watt, mikrofoninngang, rúmklang
**Leidningur og taska**
vanl. prísur 6.200 **4.800,-**

**Venson Western Guitar**
SW-300
einans **1.990,-**



**Yamaha keyboard**
PSR-260
61 tangentar
nótaundirvísing
100 ymisk ljóð
100 ymisk undirspøl
MIDI
o.m.a.
einans **2.850,-**



**Yamaha keyboard**
PSR-280
61 tangentar
nótaundirvísing
256 ymisk ljóð
100 ymisk undirspøl
6-spor upptakari
einans **3.790,-**

pétur & pétur - 320870

# ELDING

SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697



# NÝGGJÁRSKONSERT OG DANSUR



# FRÆNDUR & HIT SHOW 2000

**Fríggjakvøldið 29. des. í ítróttarhøllini á Hálsi**

**Leygarkvøldið 30. des. í ítróttarhøllini á Kambsdali**

**frá kl. 23.00-03.45**

Atgongumerki á 120,- kr. fáast í forsølu:
3'arin í SMS, Kunningarstovan í Tórshavn, Shell-støðin í Gøtudali, Kiosk Vár í Runavík, Statoil í Klaksvík og Statoil-støðin í Skálabotni

3'arin SKÁLKUR Restorffs FØROYA SPARIKASSI

Sosialurin - 311820



# SKEMT 2000

**fæst í sølubúðunum kring alt landið**
**Kostnaður 120,-**



**Nú er møguleiki fyri at ogna sær allar 12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum fyri einans 650,- kr.**

**Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20**









*Vit ynskja øllum okkara viðskiftafólkum eini gleðilig jól og gott nýggjár við tøkk fyri tað brátt farna.*

**Málarameistararnir Falkenberg**

*Ætt, vinum og kenningum kring landið og útisetum okkara ynskja vit eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár við tøkk við Johs. 3,16.*

**Gunnar, Edith og Malla**

*Øllum føroyingum verða ynskt eini gleðilig jól, og eitt av Harranum signað nýggjár.*

**Sambandsflokkurin**

## Havnar Arbeiðskvinnufelag

*Vit ynskja limum okkara við húski og viðskiftafólki annars eini góð og hugnalig jól og eitt eydnuberandi nýggjár, við tøkk fyri gott samstarv í skjótt farna ári.*

**Nevndin**

Vit takka hjartaliga øllum, sum stuðlaðu okkum við kommunuvalið 21. nov. 2000.

Gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað komandi ár ynskir

**Vágs Javnaðarfelag**

## Inventar Tænastan

ynskir øllum viðskiftafólki eini gleðilig Jól og eitt gott nýggjár og takkar fyri gott samstarv í skjótt farna ári.

tlf. 31 95 34 www.inventar.fo

*Vit ynskja øllum okkara viðskiftafólki eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár, við tøkk fyri tað brátt farna.*

**HF DEKK**

## Stóra tøkk fyri stuðulin

Vit takka øllum tykkum, sum stuðlaðu okkum á Sambandslistanum til býráðsvali á Tvøroyri.

Somuleiðis ynskja vit øllum eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár.

*Virðingarmest*

**Ketty Petersen** **Sofus Strøm** **Suni West**
**Vilhelm Meyer** **Marjun Olsen** **Terje Nielsen**
**Finnleif Guttesen**

## Frá Almannastovuni

27., 28. og 29. desember eru allar deildirnar hjá Almannastovuni stongdar.

Telfonavgreiðsla verður tó fyri bráfengistænastu nevndu dagar frá kl. 9 til 13.

**Almannastovan**

## Program-medarbeiðarastarv

Starv sum programmedarbeiðari í Útvarpi Føroya er leyst at søkja.

Tann, ið verður settur, skal hava útbúgving sum journalistur ella hava journalistiskar royndir. Fólk við aðrari relevantari úúgving ella royndum kunnu eisini søkja starvið.

Tann, ið verður settur, skal arbeiða í programmedarbeiðarabólkinum, og má rokna við at skula arbeiða við tíðindum øðrum sendingum. Arbeiðið hjá programmedarbeiðarunum er skipað í vaktum við skiftandi arbeiðstíðum.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri í 24. lønarflokki.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Fyribils er starvstíðin avmarkað til eitt ár, men møguleikar eru fyri, at talan verður um fast starv.

**Umsóknir skulu vera Útvarpi Føroya, Postboks 328, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 29. desember 2000.**

ÚTVARP FØROYA


## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192


## Starvsfólk til matstovuna hjá formula.fo

Á Formula.fo er starv leyst at søkja til setan 01.01.2001 ella skjótast møguligt

Á Formula starvast í dag 60 fólk. Tann sum settur verður í starv skal taka sær av dagligari matgerð til starvsfólkið umframt eisini matgerð til viðskiftafólk hjá okkum, sum luttaka í skeiðvirksemi okkara. Talan er um eitt áhugavert og fjølbroytt starv.

Førleikakrøv til umsøkjarar:
- Áhuga fyri matgerð
- Duga at gera góðan mat
- Álítandi

Løn sambært avtalu

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum verður at senda til

Formula.fo
Stiðjagøta 5-11
Postsmoga 1078
FO-110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við Jens Højen á telefon 311115

Umsóknarfreist er 29.12.2000

## ÚTBJÓÐING

Vegna Almanna- og heilsumálastýrið verður arbeiðið viðv. útbygging av Landssjúkrahúsinum, 3. byggistig við hesum boðið út í almenna lisitasjón.

Arbeiðið umfatar inniloking og komplettering av einum bygningi í 4 hæddum umframt kjallara og tilhoyrandi teknikkhædd, tilsamans o.u. 5200 $m^2$. Boðið verður út í niðanfyri nevndu arbeiðistøkum:

A) Inniloking
B) Timbur- og snikkaraarbeiði
C) Gólválegging
D) Málaraarbeiði
E) VVS-arbeiði
F) El-arbeiði

Lisitasjónin verður ultimo februar 2001. Tíð og stað verður kunngjørt nærri í útbjóðingarskrivi, ið verður sent teimum bjóðandi.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 9. januar 2001 við at flyta kr. 20.000,00 í veðhaldi fyri hvørja arbeiðistøku á konto nr. 1269218 í Føroya Sparikassa. Tilskilast skal á inngjaldingarfráboðanina, hvørjar arbeiðistøkur, talan er um. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent í seinasta lagi eina viku aftan á lisitasjónina.

**Sp/f Arkitektavirkið**
**Árni Winther**
Niels Winthersgøta 4
100 Tórshavn
Tel. 31 41 90

**Landsbyggifelagið P/F**
Grønlandsvegur 5
100 Tórshavn
Tel. 31 47 44

## Matrikulstovan

Stongt verður millum jól og nýggjár.

**Matrikulstovan**